FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið

Argir, 28. oktober 2013

J.Nr.: 090299-007-13

Viðgjørt:

Løgtingsmál nr. 46/2013: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ársroknskap og løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ársroknskap og løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1.

Í kongligari fyriskipan nr. 1355 frá 9. desember 2007 um at seta ársroknskaparlógina í gildi í Føroyum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 138, stk. 1, 3. pkt. verður "§ 155, stk. 2" broytt til: "§ 153 a, stk. 1".

2) Aftaná § 153 verður sett:

"Kapittul 19 a

Samskifti

§ 153a. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Skráseting Føroya um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi lóg ella av reglum, givnum sambært hesi lóg, skal fara fram talgilt.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um talgilt samskifti, m.a. um at nýta ávísar kt-skipanir, serstøk talgild snið og talgilda undirskrift el.tíl.
Stk. 3. Eini talgild boð verða mett at vera komin fram, tá ið tann, ið er móttakari, kann koma at boðunum.

§ 153b. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at Skráseting Føroya kann boða frá avgerðum og geva út onnur skjøl eftir hesi lóg ella eftir reglum, givnum sambært hesi lóg uttan undirskrift, undirskrift endurgivnari við maskinu ella endurgivnari á samsvarandi hátt ella við at nýta tøkni, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av tí, sum hevur boðað frá avgerðini ella givið út skjalið. Slíkar avgerðir og skjøl eru javnsett við avgerðir og skjøl við persónligari undirskrift.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at avgerðir, ið einans eru tiknar við støði í elektroniskari dátuviðgerð, og onnur skjøl, ið einans eru givin út við støði í elektroniskari dátuviðgerð, kunnu gevast

út bert við at tilskila Skráseting Føroya sum sendara.

§ 153c. Har tað eftir hesi lóg ella reglum, givnum sambært hesi lóg, er kravt, at eitt skjal, sum onnur enn Skráseting Føroya hava givið út, skal vera undirskrivað, kann hetta krav lúkast við at nýta eina tøkni, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av tí, sum givið hevur út skjalið, sbr. tó stk. 2. Slík skjøl eru javnsett við skjøl við persónligari undirskrift.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um at víkja frá krøvum um undirskrift. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta, at ikki kann verða vikið frá krøvum um persónliga undirskrift í sambandi við ávís sløg av skjølum."

3) § 155 verður orða soleiðis:
"§ 155. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um innlating av ársfrásagnum, undantaksváttanum o.ø., sum verður latið inn í staðin fyri hetta, og endaligir likvidatiónroknskapir, sbr. § 139, stk. 2 umframt av partársfrásagnum fyri landspartafeløg, sbr. § 148, og fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, sbr. § 148 a."

4) Aftaná § 155 verður sett:
"§155 a. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um almannakunngering av ársfrásagnum, undantaksváttanum o.ø., sum verður latið inn í staðin fyri hetta, og endaligir likvidatiónroknskapir umframt av partársfrásagnum fyri landspartafeløg og fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um atgongdina hjá roknskaparbrúkarum til skjøl, sum skrásetingin hevur almannakunngjørt.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um umgerð av ársfrásagnum og avleiðingar av hesum."

5) Í § 163, stk. 1 verður eftir "pågældende" sett: ", sbr. tó stk. 2 og 3".

6) Í § 163, stk. 2 verður "dog" strikað.

7) Í § 163 verður eftir stk. 2 sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 3.* Avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært ásetingum, givnar við heimild í § 153 a, kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

§ 2

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 10. mai 2013, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 103, stk. 1 verður sum nýtt 1. pkt. sett:
"Øll tey, ið hava skyldu at føra bókhald, eins og deyðsbúgv, feløg, felagsskapir, stovnar v.m. skulu lata fylgja við sjálvuppgávuni rakstrarroknskap og fíggjarstøðu í byrjan og enda rakstrarársins, sum nærri ásett í § 103a."

2. Aftaná § 103 verður sett:
"**§ 103a**. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at tær upplýsingar, sum nevndar eru í § 103, skulu fráboðast talgilt, og at dátuflutningur ímillum Hagstovu Føroya og TAKS skal fara fram talgilt. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta reglur um talgilda fráboðan og um nýtslu av ávísum kt-skipanum, serliga við atliti at talgildum sniði og talgildari undirskrift."

§ 3. Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2014.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at áseta heimild til at krevja, at skrivligt samskifti millum virkir, borgarar og tað almenna skal vera talgilt.

Uppskotið er grundað á arbeiði hjá einum arbeiðsbólki umboðandi Vinnuhúsið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar og almennu stovnarnar, Skráseting Føroya, Hagstovu Føroya og TAKS.

Landsstýrismaðurin fær heimild til í ávikavist ársroknskaparlógini og skattalógini í kunngerð at áseta reglur um tvungið talgilt samskifti, og í tí sambandinum m.a. eisini nærri reglur um í hvørjum talgildum sniði roknskapirnir skulu latast. Ætlanin er, at tað árini 2014 og 2015 skal bera til at lata allar roknskapir inn í PDF –sniði, men at feløg frá og við 2016 skulu senda almennu Skráseting Føroya og TAKS roknskapirnar í XBRL-sniði. XBRL er ein standardur, ið verður brúktur í altjóða høpi til roknskaparsamskifti. Við atliti at feløgum v.m., ið ikki eru fevnd av ársroknskaparlógini, er ætlanin ístaðin fyri XBRL at loyva, at roknskapirnir verða latnir inn í EXCEL-sniði.

Ætlanin er, at talgilda samskiftið skal vera eitt krav og ikki eitt val. Orsøkin til tað er ynskið um at tryggja skjótari samskifti millum fyritøkur og tað almenna, skjóta og góða tænastu frá myndugleikunum og optimering av arbeiðsgongdum bæði hjá fyritøkunum og myndugleikunum. Við at taka burtur manuellar mannagongdir og pappírshandfaring, kann tíð og tilfeingi hjá fyritøkunum og tí almenna sparast, og samskiftið millum partarnar verður smidligari, samstundis sum málsgongdirnar vera betraðar bæði hjá fyritøkum og tí almenna.

Skráseting Føroya skrásetur øll vinnufeløg og vinnurekandi grunnar. Í skránni hjá Skráseting Føroya eru skrásett 463 partafeløg, 2241 smápartafeløg, 9 vinnurekandi grunnar og 16 onnur sløg av vinnuvirkjum. Vinnufeløg, sum eru skrásett hjá Skráseting Føroya, hava skyldu at lata inn ársfrásøgn á hvørjum ári. Um hesi ikki lata inn ársfrásøgn innan freistina, verður ein rykkjari sendur til feløgini, og um ársfrásøgnin tá ikki verður send, verða feløgini send í Skiftirættin til tvingsilsavtøku.

Viðvíkjandi ársroknskaparlógini hevur Skráseting Føroya fyrst og fremst samskifti við tær fyritøkur, sum eru fevndar av lógini, m.a. limir í leiðsluni hjá fyritøkunum, grannskoðarum, sakførarum og øðrum ráðgevum, sum umboða fyritøkuna í ávísum málum.

Fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, skulu lata inn eina røð av roknskaparskjølum til Skráseting Føroya. Endamálið er, at hesi skjøl skulu vera alment atkomulig fyri áhugaðar roknskaparbrúkarar. Her er talan um ársfrásagnir, váttanir v.m., sum verða latnar Skráseting Føroya í staðin fyri ársfrásagnir, partársfrásagnir fyri feløg, skrásett á virðisbrævamarknaðinum og likvidatiónsroknskapir, sambært ársroknskaparlógini § 139, stk. 2.

Tá ið Skráseting Føroya hevur móttikið hesi skjøl, verða tey almannakunngjørd beinanvegin. Ársfrásagnir verða eisini keyptar av felagnum Experian í Danmark, sum góðskar og skipar upplýsingarnar í ein dátugrunn soleiðis, at hesar gerast meira atkomuligar og til ber at leita meira skipað í upplýsingunum.

Higartil hava feløg latið ársfrásagnir inn í papírsformi og eru ársfrásagnirnar goymdar hjá Skráseting Føroya í 5 ár. Fyri hálvum øðrum ári síðani varð telduskipanin hjá Skráseting Føroya útbygd soleiðis, at ársfrásagnir kunnu skannast inn og síðani goymast í telduskipanini í talgildum formi. Stig varð síðani tikið til at skanna allar innlatnar ársfrásagnir, sum eru yngri enn 5 ár, og er hetta arbeiðið liðugt í ár. Talan er um umleið 15.000 ársfrásagnir.

Í løtuni verða allar ársfrásagnir skannaðar og síðani goymdar talgilt. Arbeiðið at skanna er umfatandi og tíðarkrevjandi, tí talan er um stórar nøgdir. Fyri at rationalisera og gera hesa arbeiðsgongd meira virkna ynskir Skráseting Føroya at umskipa mannagongdina soleiðis, at feløg frameftir sjálvi skulu framleiða ársfrásøgnina í talgildum líki og sjálvi lata inn ársfrásøgnina umvegis eina heimasíðu. Soleiðis er ætlanin at talgilda atgongdina til ársfrásagnir hjá vinnufeløgum. Hetta kemur at hava við sær, at borgarar og virkir eisini fáa atgongd til ársfrásagnirnar umvegis heimasíðuna hjá Skráseting Føroya.

Fyrimunirnir við eini slíkari skipan er, at skrásetingin av ársfrásagnum verður minni arbeiðskrevjandi og fer at økja um atkomuligheitina til upplýsingarnar fyri borgarar og vinnu. Harvið verður virðið, sum hesar upplýsingar hava fyri samfelagið, økt.

Ynskiligt hevði verið, at talgild undirskrift varð nýtt at lata ársfrásagnir og onnur skjøl til Skráseting Føroya í talgildum formi. Men í løtuni er eingin viðurkend føroysk talgild undirskrift. Inntil Føroyar fáa eina viðurkenda talgilda undirskrift er ætlanin, at Skráseting Føroya skal nýta Vinnugluggan hjá TAKS sum innlatingarstað.

Vinnugluggin er eitt stig ímóti øktari sjálvavgreiðslu fyri vinnuna. Vinnugluggin er, sum navnið boðar frá, ein gluggi, har vinnan kann fáa innlit í og avgreiða nøkur av sínum viðurskiftum við TAKS. Vinnugluggin er fyri øll, sum hava v-tøl.

Møguligt er hjá feløgum o.ø. at lata inn sjálvuppgávu og roknskapir umvegis Vinnugluggan.
Í Vinnuglugganum er møguligt at avgreiða MVG-uppgerðir, tollingaráheitanir og tollrokningar. Umframt hetta er eisini møguligt at síggja lønaryvirlit og kontoavrit. Harvið fær vinnan møguleika at halda seg dagførda um síni kontoviðurskifti, eins og hon fær innlit í, hvørjar upplýsingar TAKS hevur um hvørt einstakt virki ella felag.

Umframt kontoavrit og lønaryvirlit kunnu grundupplýsingar, so sum bústaðarupplýsingar, eisini síggjast í Vinnuglugganum. Sostatt kunnu virkir og feløg vissa seg um, at TAKS hevur røttu upplýsingarnar um tey.

Í Vinnuglugganum ber til at rætta áður innlatnar MVG-uppgerðir. Um ein MVG-uppgerð verður gjørd, áðrenn seinastu gjaldsfreist, ber til at seta gjaldingina til at verða framda falldagin. Tað ber eisini til at síggja, hvat fellur til gjaldingar hvønn 28. í mánaðinum.

Bókhaldarar og grannskoðarar kunnu fáa beinleiðis atgongd til Vinnugluggan hjá teimum virkjum, tey arbeiða fyri. Harvið er ikki neyðugt hjá teimum at venda sær til TAKS fyri at fáa fatur á upplýsingum, sum annars eru í Vinnuglugganum. Bókhaldarar og grannskoðarar fáa atgongd við at ábyrgdarleiðarin á virkinum (kundin) fyllir út oyðublað og sendir tað til TAKS.

Hetta lógaruppskot merkir, at TAKS frá 2014 sleppur undan manuella arbeiðnum í samband við móttøku av roknskapum frá privatum fyritøkum. Frá 2016 sleppur stovnurin eisini undan inntøppingararbeiðnum, og samstundis fær stovnurin møguleikar, sum stovnurin ikki hevur í dag, at gera greiningar, ið koma at styrkja munandi um eftirlitsarbeiðið hjá stovninum.

Roknskapartøl eru høvuðskeldan, tá Hagstovan ger ískoytið til BTÚ frá privata vinnuliga geiranum upp. Talan er aloftast um endurnýtslu av roknskapum, sum eru gjørdir til annað brúk, og sum Hagstovan fær frá eitt nú TAKS, Skráseting Føroya ella vinnuvitan.biz. Í teim førum, tá almennu/skattligu roknskapirnir ikki eru nóg væl útgreinaðir til brúk hjá Hagstovuni, vendir Hagstovan sær beinleiðis til einstøku fyritøkuna fyri at fáa neyðuga tilfarið. Frameftir fer Hagstovan at fáa roknskaparupplýsingarnar talgilt umvegis Vinnugluggan hjá TAKS. Hetta merkir, at stovnurin frá 2016, tá allir roknskapir hjá feløgum verða latnir inn í XBRL sniði, sleppur undan at tøppa roknskapirnar inn í teirra telduskipan.
Umsóknarblaðið er at finna undir Oyðubløð – Vinnugluggin.

Síðan 1. januar 2013 skulu vinnukundar hjá TAKS, sum ikki nýta hentleikarnar í Vinnuglugganum, rinda ómaksgjøld. Samstundis verður tað ókeypis hjá vinnukundum, ið brúka Vinnugluggan, at avgreiða toll og MVG.

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Vinnuhúsinum og Felagnum føroyskir Grannskoðarar, men hvørgin teirra hevði viðmerkingar til uppskotið.

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Ein millión. kr. er sett av á fíggjarlógini fyri 2013 til at fremja hesa verkætlan. TAKS metir, at lógaruppskotið merkir, at stovnurin longu frá 2014 kemur at spara pening, og frá 2016, tá roknskapirnir verða sendir inn í XBRL sniði, kemur sparingin at verða ein millión krónur árliga. Frá 2016 kemur uppskotið eisini at merkja sparingar fyri Skráseting Føroya og Hagstovu Føroya.

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

Uppskotið hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar

avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki við sær sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið er ikki tengt at millumtjóða sáttmála.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	Nei

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1.

Nr. 1.

Talan er um rætting av tilvísing.

Nr. 2.
§ 153 a
Fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, skulu lata Skráseting Føroya eina røð av skjølum, m.a. ársfrásagnir.

Ársroknskaparlógarinnar § 155 hevur reglur um innlating og almannakunngering av ársfrásagnum o. ø. og um samskiftið millum Skáseting Føroya og fyritøkurnar. Reglurnar heimila at áseta fyrisingarligar reglur um nevndu viðurskifti.

Eftir galdandi § 155 kann samskiftið millum Skráseting Føroya og fyritøkurnar fara fram á pappíri ella digitalt eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

Nýggja § 153 a kemur í staðin fyri galdandi § 155, stk. 1, 1. og 2. pkt., og stk. 2, 1. og 2. pkt., við tí broyting, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta reglur um tvungið digitalt samskifti. Heimildin fevnir um skrivligt samskifti til og frá Skráseting Føroya um øll viðurskifti, sum eru fevnd av ársroknskaparlógini og kunngerðum sambært lógini. Tað vil siga ikki bert innlating av roknskaparskjølum og samskifti í tí sambandinum, men eisini t.d. fyrispurningar um tulkingarspurningar umframt samskifti í sambandi við eftirlitsmál.

Telduskipanirnar hjá Skráseting Føroya eru tó ikki enn mentar til tess at tað í løtuni kann krevjast fult tvungið digitalt samskifti. Tvungið digitalt samskifti verður tí sett í verk so hvørt sum telduskipanirnar hjá Skráseting Føroya eru mentar til tað.

Í fyrstu atløgu er ætlanin, at allar ársfrásagnir skulu latast Skráseting Føroya í talgildum formi. Frameftir verður sett sum krav, at øll roknskaparskjøl, herundir váttanir um frávik v.m., skulu sendast Skráseting Føroya talgilt.

Ætlanin er, at tað seinni verða settar reglur um, at skrivligt samskifti annars til og frá Skráseting Føroya um viðurskifti, sum eru fevnd av lógini ella reglum, settar sambært lógini, skal fara fram talgilt, t. d. við t-posti. Tá kunnu eisini ásetast reglur um, at Skráseting Føroya kann krevja, at viðskiftafólk upplýsa ein teldupost bústað, sum kann nýtast í samskiftinum viðvíkjandi viðgerð av ávísum máli. Í hesum føri kann tað áleggjast viðkomandi ein skylda at fráboða Skáseting Føroya, um viðkomandi broytir teldupost bústaðin.

Uppskotið hevur við sær, at skrivligar fráboðanir o.a. til skrásetingina um viðurskifti, sum eru fevnd av lógini ella reglum settar sambært lógini, ikki verða mett at vera móttikin í skrásetingini, um tey verða latin inn á annan hátt, enn á fyriskipaða talgilda háttin.

Talgildi hátturin at fráboða kann nýtast av virkinum ella ráðgevum, m.a. advokatinum ella grannskoðaranum hjá virkinum. Um Skráseting Føroya fær illgruna um, at atgongdin at lata ársfrásagnir inn talgilt v.m. verður misbrúkt, kann Skráseting Føroya beinanvegin steingja atgongdina hjá brúkaranum at nýta talgildu skipanina. Í hesum føri kann krav setast um, at ársfrásøgnin v.m. verður latin inn av einum øðrum, t.d. advokati ella grannskoðara, ella í ávísum førum verður latin inn í pappírsformi.

Eini talgild boð verða mett at vera komin fram, tá ið tann, ið er móttakari, kann koma at boðunum. Eini talgild boð verða mett at vera komin fram til Skráseting Føroya tá ið Skráseting Føroya kann koma fram at boðunum. T.v.s. tá Skráseting Føroya kann viðgera talgildu boðini. Vanliga verður tíðin skrásett í skipanini. Eini boð, sum eru komin eftir klokkan 24.00, verða mett at vera komin fram tann dagin, Skráseting Føroya kann koma at boðunum.

Eini talgild boð verða mett at vera komin fram til virkið ella persónin, tá ið tann, ið er móttakari, kann koma at boðunum. Tað hevur ongan týdning um viðkomandi ikki kann útvega sær atgongd til boðini, um hetta er orsakað av forðingum, sum viðkomandi sjálvur hevur ábyrgdina av. Sum dømi kann nevnast, at teldan hjá viðkomandi er óvirkin, ella at viðkomandi hevur mist loyniorðið burtur.

§ 153 b
Ásetingin er endurtøka av galdandi áseting í § 155, stk. 1, 2. og 3. pkt. og stk. 2, 2. og 3. pkt. og hevur sostatt ikki broytingar í rættarstøðuni við sær.

§ 153 c
§ 153 c viðvíkur undantøk frá krøvum um undirskrift av skjølum, sum onnur enn Skráseting Føroya hava givið út, har tað sambært lógini ella reglum við heimild í lógini er krav, at skjalið skal vera undirskrivað. Talan er um skjøl, sum eru útflýggjað av leiðsluni á virkinum ella av grannskoðaranum.

Eftir stk. 1 í uppskotinum er tað ein fortreyt fyri at lata vera við at nýta perónliga undirskrift, at undirskriftin nýtir tøkni, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av viðkomandi, t.d. talgilda undirskrift.

Í stk. 2 í uppskotinum er ásett, at landssýrismaðirin kann áseta nærri reglur um, hvussu kravið um persónliga undirskrift kann vera frávikið. Við heimild í uppskotinum kunnu reglur ásetast um, at kravið um persónliga undirskrift ikki kann frávíkjast fyri ávís sløg av skjølum.

Nr. 3.
Reglurnar um samskifti í galdandi § 155 eru fluttar til §§ 153 a og 153 b í uppskotinum. Uppskotið er endurtøka av reglunum í § 155, stk. 3 í galdandi lóg um heimild at áseta reglur um innlating av ársroknskapum o.ø. við tí ískoyti, at endaligir likvidatiónsroknskapir, sum eru sendir til Skráseting Føroya sambært § 139, stk. 2, eisini eru umfataðir av heimildini at áseta reglur um at lata inn roknskapir o.a. til Skráseting Føroya. Annars er ásetingin endurtøka av galdandi áseting í § 155, stk. 1, 2. og 3. pkt. og stk. 2, 2. og 3. pkt. og hevur sostatt ikki aðrar broytingar í rættarstøðuni við sær.

Nr. 4.
§ 155 a í uppskotinum endurtekur heimildina í galdandi 155, stk. 3, 1. pkt. at áseta reglur um at almannakunngera ársfrásagnir o.a.

Nr. 5--7.
Avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært ásetingum, givnar við heimild í § 153 a, kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika. Hinar broytingarnar í § 163 eru broytingar, sum fylgja av nýggja stk. 3 í § 163.

Til § 2.
Nr. 1 og 2.
Við uppskotinum verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um talgilda fráboðan av upplýsingum um rakstrarroknskap og fíggjarstøðu í byrjan og enda rakstrarársins, sum skulu fylgja við sjálvuppgávuni.

Til § 3.
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 28. oktober 2013

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason